## Fiskurin framvegis álitið



Tað hóvar ikki júst grønlendska fiski- og veiðimannafelagnum KNAPK, at eitt av málunum við komandi politikkinum er at skerja talið á teimum, sum hava fiskivinnu sum vinnuveg. Siverth Amundsen, ráðgevi hjá KNAPK, sigur við kringvarpið KNR, at tað hevur ongantíð verið felagsins politikkur at skerja fiskimannatalið, men at tað neyvan slepst undan, at nakrir fella frá, um vinnan skal vera burðardygg. Hinvegin ivast hann ikki í, at fiskurin verður álitið í framtíðini, tí enn røkist einki fyri, at oljan skal loysa hann av, sigur hann.

## Duga ikki at skriva

Tað eru bara nakrir fáir næmingar, sum fáa besta karakterin, tá teir fara úr danska fólkaskúlanum. Høvuðsorsøkin er, at tey ungu duga ikki nóg væl at stava, og so eru tey heldur ikki nmóg stinn í málløru. Tað stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing frá danska kenslumálaráðnum. Har stendur millum annað, at bara 16 prosent av næmingunum fingu 10 ella 12 í karakteri í danskari rættskriving í fjør. Úrslitið er nógv verri, enn tað eigur at vera eftir altjóða ECTS-stiganum. Eftir honum skuldu 35 prosent fingið teir bestu karakterirnar.

# Komin til heiður og æru aftur

**Gamli matvøruhandilin hjá Jens Eli Ellefsen er komin til heiður og æru aftur. Men í staðin fyri alskyns kolonialvørur, er tað nú fiskur av mesta slagi, ið fyllir hillar og frystiboksir**

HANDILSLÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Beint undan ársskiftinum læt ein nýggjur handil upp í Miðvági. Tað vil siga, har hevur verið handil fyrr, men tað eru mong ár síðani hann læt aftur. Tað var tá í tíðini ein kolonialhandil, men nú er mjøl og rosinur skift út við laks og rækjur.

Tað er nevniliga komin ein fiskahandil í bygdina, og hóast vit eru fiskivinnutjóð burtur av, so finst neyvan nakar annar fiskahandil sum so í Føroyum. Handlar eru, sum gera rættiliga nógv burtur úr fiskamati, men Fiskakjallarin, sum handilin í Miðvági eitur, er hin einasti, sum selur fisk burturav.

Tað er fyrrverandi handilsmaðurin og reiðarin, Jens Eli Ellefsen, sum hevur tikið stig til hendan nýggja fiskahandilin, og tað er eisini hann, sum rekur hann.

- Vit byrjaðu í smáum beint undan ársskiftinum, og tað hevur bara gingið heilt hampiligt. Vágafólk hava tikið væl ímóti handlinum, haldi eg, vit kunnu siga, greiðir Jens Eli Ellefsen frá.

Hann hevur brúkt hesa tíðina frá handilin læt upp til nú at byggja eina vørugoymslu upp, og nú kann hann bjóða eitt breitt úrval av fiska- og sjómati.

- Trupulleikin hevur verið, at tað hevur verið so ómetaliga ringt at fingið fatur á fiski, so eg haldi fólk eru glað fyri, at tey nú kunnu koma her og fáa fríska fyrstafloks vøru, sigur Jens Eli Ellefsen.

### Bert frá útróðrarbátum

Nú skal ikki remsast upp her alt tað, sum er at fáa í Fiskakjallaranum, men av eitt sindur meira forkunnugum fiskavørum kunnu nevnast havtaskuhalar og saltfisk.

- Vit gera alt til sjálvi. Skera fiskin, salta hann til saltfisk, vacuumpakka hann og so framvegis. Vit hava eini høli niðri við keiina, sum eru góðkend av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, og har hagreiða vit allan fiskin, sigur Jens Eli Ellefsen.

Rávøruna fær Fiskakjallarin alla frá útróðrarbátum.

- Sonurin hevur ein kanadiskan bát og rør út, so frá honum fái eg ein stóran part av rávøruni. Restina fái eg frá øðrum útróðrarbátum, tí eftir at virkið í Miðvági er latið aftur, fæst einki haðani, og tað, sum kemur upp á land til landingarmiðstøðina í Sørvági, fer beinleiðis av oynni í lastbilum, sigur Jens Eli Ellefsen.

Men tá nú fiskahandilin liggur í Vágunum, er tað bara náttúrligt, at flakið í handlinum kemur frá flakatrolaranum Vesturvón.

Annars fæst eisini laksur, bæði sum flak og sum kotelettir, rækjur, scallops og ræstur og turrur fiskur, fyri at nevna nakrar vørur aftrat. Og so sjálvandi eisini fiskafrikadellir og knettir.

### Víðka úrvalið

Júst nú er vertíð fyri rognum, men tey eru heldur ikki so líkatil at fáa fatur á. Kortini hevur tað eydnast hjá Fiskakjallaranum at fáa nakað av hesum góðbita, og í tí sambandi verða seld rogn og feskur fiskur í dag og í morgin til vanliga upplatingartíð, sum er frá 10 til 12 og frá 15 til 17.30 gerandisdagar og frá 10 til 12 leygardagar.

Annars er Fiskakjallarin í ferð við at seta saman eitt tilboð til fólk, sum skulu ferðast um flogvøllin til eitt nú Danmarkar, og sum fegin vilja hava nakað av forkunnugum fiskavørum niður við til vinir ella kenningar.

- Talan verður um serliga pakkaðar eskjur, sum egna seg væl til at hava við í flogfarinum. Fólk kunnu eisini ringja framman undan (á tlf. 332414), og so er pakkin klárur av heinta, tá tey koyra framvið á veg á flogvøllin, sigur Jens Eli Ellefsen.

Hann arbeiðir eisini við øðrum víðkanum av útboðnum. Eitt nú er hann í holt við at kanna, um tað ber til at flyta lomviga inn til Føroya úr Íslandi, og fæst hendur á lunda, tá tann vertíðin er, so verður tað eisini partur av vøruskránni. Sama er galdandi við náta, tá tann tíðin kemur.

Men í løtuni fegnast Jens Eli Ellefsen bert um, at hann hevur lagt væl frá landi við Fiskakjallaranum í Miðvági.



*Síðani Fiskakjallarin læt upp beint fyri ársskiftið, hevur Jens Eli Ellefsen fingist við at upparbeiða eina væl assorteraða vørugoymslu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Semja um royndarmál

**Á rættarforhandlingum í Føroya Rætti mikudagin varð semja millum sakføraran hjá TAKS, Inga Højgaard, og umboð fyri tey um 20 sakarmálini móti stovninum um, at tvey mál, ið umboða øll aspektir í málunum, verða førd sum royndarmál**

BILAKEYP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá lógin um skrásetingargjøld av akførum í 1999 varð broytt, fylgdi kunngerðin um heimild at krevja inn hesi gjøld ongantíð við. Hetta førdi við sær, at TAKS í heili seks ár uttan heimild kravdi inn hesi gjøld frá bilasølunum, sum so aftur kravdu tey inn frá keyparunum.

Ikki fyrr enn í 2005, tá tað komst fram til, at heimildin vantaði, var hesin brølarin rættaður, so heimild nú finst fyri innkrevjingini.

Men hetta hevur so fingið bileigarar, sum hava keypt bil í tíðarskeiðinum 1999 til 2005, at stevna TAKS eftir pengunum, sum teir – sambært saksøkjarunum – ólógliga hava kravt inn.

TAKS hevur svarað, at talan er um ein spurning millum bilasøluna og keyparan, og tað hevur so ført til, at keypararnir í teimum førum, har tað ber til, eisini hava stevnt bilasølunum – sum so aftur hava stevnt TAKS.

Við rættarforhandlingunum legði dómarin upp til, at vald var ein ella fleiri sakir, sum vóru umboðandi fyri allar síðir av málinum, og semja varð síðani gjørd um, at velja tvær sakir út. Onnur hevði flest øll aspektir: Stevning móti TAKS og stevning móti bilasøluni, bilasølan hevði stevnt TAKS, og viðkomandi hevði tveir bilar, har málið um annar var fyrnað.

Í hinari sakini er bilasølan ikki til longur, og tí er TAKS einasti møguleiki fyri stevning.

Dómarin heitti eisini á sakføraran hjá TAKS, Inga Højgaard, um at taka málið upp við stovnin, um hann var sinnaður at gjalda sakarmálskostnaðin.

Bjørn á Heygum umboðar umrødda samsøkjara í øðrum málinum, og seg sjálvan í hinum málinum, sum snýr seg um bert at saksøkja TAKS. Eisini Jógvan Elias Winther Poulsen og Aksel V. Johannesen vóru møttir fyri klientar, og teir tóku undir við at koyra hesar báðar royndarsakirnar.

Tá greiða fyriliggur um TAKS góðtekur at halda sakarmálskostnaðin og um stovnurin annars góðtekur at koyra tvær royndarsakir, sum skulu verða umboðandi fyri allar hinar, verður nýggjur rættarfundur ásettur.